


# Íløgur í gransking í mun til BTÚ minka

## Hvat hugsa politikkararnir fyri sær?

***Viðmerkingar í samband við***
***fíggjarlógaruppskot og onnur lógaruppskot móti ársenda.***

Magnus Danielsen




NVD*Rit* 2007:14

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN
Faculty of Science and Technology
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

Heiti / Title **Íløgur í gransking í mun til BTÚ minka**

**Hvat hugsa politikkararnir fyri sær?**

Viðmerkingar í samband við

fíggjarlógaruppskot og onnur lógaruppskot móti ársenda.

Høvundar / Authors Magnus Danielsen

Ritslag / Report Type *Upprit/Notes*

NVD*Rit* 2007:14
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin
ISSN 1601-9741
Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

# Íløgur í gransking í mun til BTÚ minka
# Hvat hugsa politikkararnir fyri sær?

Viðmerkingar í samband við fíggjarlógaruppskot og onnur lógaruppskot móti ársenda.

**Talan er um eitt fall av íløgunum til gransking í mun til BTÚ, og ikki ein øking.**
Vinnuvitan upplýsir sum stórtíðindi, at nú fer granskingin at fáa 5 mill. kr. aftrat í 2008, og sigur í næstu linju, at 1,8 mill. kr. fara til KST útbúgvingar. Tað átti, at verið greitt, at sambært OECD definitiónunum er hægri útbúgving, hóast vísindaligt arbeiði, ikki flokkað sum gransking. Sostatt er uppskotið til meirjáttan ikki 5, men gott 3 mill.kr. at býta millum granskingargrunnin við 2 mill.kr. og fiskivinnugransking við 1 mill.kr.

Meirjáttanin til gransking uppá 3 mill. kr. er snøgt 3,6 % av teimum 84 mill. kr., sum í 2003 vórðu uppgjørdar at vera føroyska kvotan til gransking og menning (sambært Granskingarráðnum). Síðan er eingin dagførd taldokumentatión komin á borðið hesum viðvíkjandi, men mett verður, at upphæddin er ikki nógv størri nú.

Men sokallaða meirjáttanin uppá 3 mill. kr. gevur ikki ein veruligan prosentiskan vøkstur í mun til BTÚ uppá 3,6%, men bert eitt slag av regulering av *fallandi íløguni* til gransking við tað, at tað samstundis má staðfestast, at Landsbanki Føroya í búskaparmeting 28.juni 2007 uppgevur ein árligan vøkstur av bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ) uppá 8 %, eins og lønarvøksturin eisini er mettur til 8% árliga.

Sostatt er veruleikin, at næsta ár, alt annað líka, verður *eitt fall uppá yvir 4 %* í íløgunum til gransking í mun til BTÚ.

**Hví ikki siga sum er, at gransking og menning fær fallandi íløgur?**
*OECD* ásetur, at gransking og menning (G&M) eigur at fáa 3 % av BTÚ. Talið fyri Føroyar var 0.87 % av BTÚ í árinum 2003, ella 84 mill.kr (sambært Granskingarráðnum), ið neyvan er hækkað síðan. BTÚ var 9,7 mia.kr. í 2003 og er mett til 12 mia.kr. í 2007 (sambært Landsbanka Føroya). Við "sokallaðu meirjáttanini" uppá 3 mill.kr., ið politikkararnir bjóða føroyskum granskarum, fellur talið fyri Føroyar til 0.72 % av BTÚ til føroyska gransking í 2008. Hetta er ikki júst tað, sum so nógv politisk agitatión hevur róð uppundir, ella er kanska meiningin at bera blak fyri eyguni á fólki?

Ein meira beinleiðis mannagongd til hækking av granskingarstiginum var at økja um granskingaríløgurnar við einum 50 mill.kr. á hvørjum árið uttan íbland av óviðkomandi íløgum, inntil tilmæli frá OECD uppá 3% av BTÚ svarandi til 360 mill.kr til gransking og menning er nádd um 5 ár.

**Granskaraparkin kann gerast ein ólukka fyri føroyskt vísindaligt arbeiði?**
Nú verður granskarapark løgd fyri løgtingið. Hon er á pappírinum sett til at kosta 75 mill.kr. Hetta er peningur til ein bygning og ikki til vísindaligt arbeiði. Fyri at reka granskaraparkina er í uppskotið at seta av útvið 60 mill.kr. í 4 ár. Hesar upphæddir kunnu samberast við samlaðu árligu íløgurnar í gransking og menning uppá o.u. 84 mill.kr. – almennar og privatar – í Føroyum, sum er. Við tí í huganum, at politiski viljin at økja um granskingina í Føroyum er á einum út av lagi lágum støði, kunnu hesar 130-140 mill.kr. til granskingarpark fáa politiska viljan til íløgur í veruliga mennandi gransking aftrat til at falla til nærum eitt nullpunkt.

Betur var at brúkt henda pening beinleiðis til at fremja granskingina og fáa úrslit í bræði.

**Hægri undirvísing er niðurpínd**
Fíggjarlógaruppskotið sigur, at 1,8 mill.kr. eru avsettar til nýggjar útbúgvingar, KT og løgfrøði.

Tað er ikki eiti á sum politikkarar kunnu fáa nógv fyri pengarnar.

Hagtøl frá OECD vísa, at umleið 1.4 % (í OECD í meðal 2004) av BTÚ fara til hægri útbúgvingar í framkomnum londum, væl at merkja umframt málsetningin 3 % til G&M. Tí átti universitetið í Føroyum at havt o.u. 2% av BTÚ til hægri útbúgvingar og gransking, ella einar 250 mill.kr. (Mett BTÚ í 2007 = 12 mia.kr sambært Landsbanka Føroya). Fróðskaparsetur Føroya fær sum nú er (2007) 20 mill.kr árliga á fíggjarlógini.

18. oktober 2007 Magnus Danielsen, professari
Fróðskaparsetur Føroya, Náttúruvísindadeildin